Nýggja steypið skal handast

Um vikuskiftið verða dystirnir í steypakappingini hjá dreingjum leiktir. Her er talan í ár um nýtt steyp, og er tað Prentmiðstøðin, sum hevur latið hetta. Sigandi heitið á steypinum er blaðberarasteypið, og lítið er at ivast í, at onkur av teimum, sum leygardagin fær hendur á steypinum, eisini er við í liðnum hjá Prentmiðstøðini, sum ber føroysku dagbløðini út kring landið. Fríggjadagin vóru tvær hálvfinalur á skránni, og skuldu ávíkavist HB-VB og B36-EB/S tá stríðast um finaluplássið. Sjálvur finaludysturin verður leiktur leygardagin.

-jm

Julian vann

Tað glapp burtur ímillum í fríggjadagsútgávu okkara, men føroyingaupp-gerðin í Íslandi mikudagin endaði við, at Julian Johnsson og ÍF vunnu 2-0 á útivølli móti Fram. Allir tríggir føroyingarnir byrjaðu inni á vøllinum, og eftir ein javnan fyrra hálvleik eydnaðist beint undan steðginum ÍF at leggja seg á odda.

Fyri Fram var seinni hálvleikur einki serligur. Málverjin fekk reyða kortið, og beint eftir økti ÍA til 2-0. Og síðani fóru tríggir av leikarunum hjá Fram skaddir av vølli. Teirra millum stórspælarin, Rikhardaru Dadason.

Úrslitið ber við sær, at ÍA nú er á øðrum plássi í deildini, men saman við Fram hava teir so leikt ein dyst fleiri enn hini liðini.

Í Fram tykist lagið tó framvegis at vera gott. Á heimasíðuni verður sagt, at nú trý umfør eru leikt, er talan um bestu úrtøku felagsins í fleiri ár, og tí halda tey, at hóast tapið, so hevur felagið nógv at fegnast um.

-jm

Skála er favorittur

Veddingarfyritøkan, NordicBet, hevur eisini føroyskar dystir á útboðið sínum. Til ber at vedda um dystirnar í føroysku fyrstudeild, og her framgongur millum annað, at Skála verður roknaður sum lítil favorittur, tá teir leygardagin taka ímóti B36.

Her verður tó roknað við einum sera jøvnum dysti, og tað sama er talan um, tá NSÍ tekur móti KÍ. Størsti favoritturin er HB, har tað bert ber til at spæla handicap-spæl. Tað vil siga, at um talan skal gerast um 1-tal í tí dystinum, skal HB vinna við minst tveimum málum. Oddsini fyri ymsu dystirnar finnast á heimasíðu felagsins, og fyri føroysku 1. deild eru tey hesi:

Dystur	1	X	2
VB-ÍF	1,60	3,20	4,70
GÍ-EB/S	1,65	3,15	4,35
HB-B68 (H 0-1)	1,85	3,00	3,60
NSÍ-KÍ	2,25	3,55	2,35
Skála-B36	2,25	3,65	2,30

-jm

Triathlon á hvítusunnu

Kapping í 1/4 triathlon verður 2. hvítusunnudag.

Tá kappast verður í 1/4 triathlon verður fyrst svomið 1500 m, súkklað 40 km og at enda runnið 10 km.

Byrjað verður í svimjihøllini í Havn, og síðan verður súkklað til Kaldbak (nýggja byggistigið), har vent verður. Súkklað verður inn á Kaldbaksbotn, har vent verður áðrenn mann kemur út á landsvegin aftur. Leiðin gongur aftur til Kaldbak (nýggja byggistigið), har vent verður og so gongur leiðin allan vegin til Havnar aftur. Koyrt verður niðan til ringkoyringina við Ringvegin/R. C. Effersøesgøta, og síðan oman á mál við Plantusøluna á Hvítanesvegnum.

Tá runnið verður verður runnið frá Plantusøluni til Føroya Sparikassa Yviri við Strond og aftur til Plantusøluna. Hesin teinur skal rennast tvær ferðir.

HB-B68:

Jákup verður kanska við

Fríggjadagin verður avgjørt, hvørt Jákup á Borg sleppur heim til Føroya, soleiðis at hann longu nú kann verða partur av HB-liðnum

UPPTAKT
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Líkt er nú til, at Jákup á Borg fyri fyrstu ferð kann fara í troyggjuna við 9'talinum

Stóri spurningurin í HB-húsinum – og kanska eisini longuri suðuri – er, hvørt Jákup á Borg fer at verða á HB-liðnum leygardagin, tá B68 er á vitjan.

Sambært leigusáttmálanum, sum OB og HB gjørdu, skuldi Jákup annars vera í OB, til danska kappingin var liðug, og tað vil siga eisini hetta vikuskiftið.

Tað vildi viðført, at fyrsti dysturin hjá Jákupi vildi verið ímóti B36, og hóast hetta ljóast sum ein spennandi uppgáva, so tykjast bæði HB og Jákup at halda, at tað vildi verið skilabest, um leikarin í øllum førum fekk ein dyst á liðnum undan hesum.

Og møguleiki skuldi verið fyri hesum. Nú bert eitt umfar er eftir av donsku kappingini, hevur Jákup enn ikki fingið spælitíð á besta OB-liðnum, og tá kappingin hjá eykaliðnum er av á hesum sinni, verður kanska talan um fríviku-skifti.

– Eg havi so spurt meg fyri, um tað er møguleiki at sleppa heim longu fríggjadagin, men svarið upp á hetta fái eg so ikki fyrr enn sama dag, segði Jákup, tá vit høvdu orð á hann hóskvøldið.

Í aðrar mátar tykist HB-hópurin tó at vera hampuliga væl fyri. Martin Christensen noyddist av vøllinum við skaða seinast, og hann verður neyvan tøkur. Tað verður Hans á Lag heldur ikki, eftir at hann annars var um at koma fyri seg. Verjuleikarin kom eisini á vøllin sum skiftisleikari í dystinum móti ÍF, men síðani er knæskaðin aftur farin at gera um seg, so hildið verður, at ráðiligasta í løtuni er, at steðgurin verður longdur.

Lagið í botni

Á Toftum man fótbóltslagið í løtuni ikki vera av tí besta. Enn er einki stig komið til høldar, og á útivølli móti meistaraliðnum sigur tað seg sjálvt, at talan er um trupla uppgávu.

Og líkt er eisini til, at toftamenn verða skerdir til dystin. Mikkjal Thomassen, sum var maðurin, sum skuldi lyfta arvin á miðvøllinum, keikti fótin seinast, og enn verður ikki roknað við, at hann er tøkur. Eisini Bogi Petersen hevur drigist við skaða, men tá vit frættu av Toftum seinast, varð tó roknað fyri vist, at hann verður klárur leygardagin.

Støðan, 1. deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	v mál	t mál	mál-munur	stig
1 Skála	4	3	-	1	-	0	11	4	7	10
2 B36	4	2	-	2	-	0	10	3	7	8
3 HB	4	2	-	1	-	1	5	4	1	7
4 GÍ	4	2	-	1	-	1	6	6	0	7
5 KÍ	4	1	-	3	-	0	6	5	1	6
6 VB	4	1	-	2	-	1	4	3	1	5
7 NSÍ	4	1	-	2	-	1	7	8	-1	5
8 ÍF	4	1	-	0	-	3	9	11	-2	3
9 EB/Streymur	4	0	-	2	-	2	2	8	-6	2
10 B68	4	0	-	0	-	4	2	10	-8	0

Støðan, 2. deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	v mál	t mál	mál-munur	stig
1 TB	4	4	-	0	-	0	16	5	11	12
2 Royn	4	3	-	0	-	1	13	8	5	9
3 B71	4	3	-	0	-	1	10	11	-1	9
4 AB	4	2	-	1	-	1	6	5	1	7
5 FSV	4	2	-	0	-	2	15	9	6	6
6 Sumba	4	2	-	0	-	2	8	8	0	6
7 B36	4	2	-	0	-	2	8	10	-2	6
8 KÍ	4	0	-	1	-	3	7	12	-5	1
9 VB	4	0	-	1	-	3	5	12	-7	1
10 LÍF	4	0	-	1	-	3	4	12	-8	1

Danska superligan

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 FCK (M)	32	19	-	8	-	5	52	25	27	65
2 Brøndby (S)	32	19	-	7	-	6	53	28	25	64
3 Esbjerg	32	17	-	8	-	7	65	41	24	59
4 OB	32	15	-	9	-	8	62	46	16	54
5 AaB	32	15	-	9	-	8	52	40	12	54
6 FCM	32	14	-	6	-	12	64	48	16	48
7 Viborg	32	10	-	9	-	13	45	44	1	39
8 AGF	32	11	-	3	-	18	45	65	-20	36
9 FC Nordsj.	32	7	-	11	-	14	33	55	-22	32
10 Herfølge	32	8	-	7	-	17	34	53	-19	31
11 Frem	32	8	-	3	-	21	37	59	-22	27
12 AB	32	8	-	2	-	22	30	68	-38	26

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

Íslendska Landsbankadeildin

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Keflavík	2	2	-	0	-	0	5	2	3	6
2 ÍA	3	1	-	2	-	0	3	1	2	5
3 Fram	3	1	-	1	-	1	4	3	1	4
4 Fylkir	2	1	-	1	-	0	2	1	1	4
5 KA	2	1	-	0	-	1	2	2	0	3
6 FH	2	1	-	0	-	1	1	1	0	3
7 ÍBV	2	0	-	2	-	0	2	2	0	2
8 Grindavík	2	0	-	2	-	0	1	1	0	2
9 KR	2	0	-	0	-	2	1	4	-3	0
10 Víkingur R	2	0	-	0	-	2	0	4	-4	0

Vikuskifti

Nr. 101 • leygardagur • 29. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Tá ið málini verða sett

Tinghellan á s. 6–7

Hitt-makarin úr Uriah Heep

Heimsgitni tónleikarin og tónaskaldið, Ken Hensley, vendi eitt skifti tónleikinum fullkomiliga bakið. Men seinni árini hevur aftur verið á palli, og í august kemur hann til Føroya



Stóra legendan, hitt-makarin Ken Hensley, er best kendur úr tónleikabólkinum Uriah Heep, har hann spældi frá stovnan í 1970 til 1980. Hann tók seg heilt burtur úr tónleikalívinum í áttatiárunum, men var aftur at hoyra í nítiárunum. Nú er hann ofta á palli, og í august verður hann at síggja og hoyra í Klaksvík

Eirikur Lindenskov

Livandi legendan úr Uriah Heep, Ken Hensley, fer at spæla heimshittini, sum hann hevur skrivað, á Summar Festivalinum 2004. Hvør kennir ikki sangir sum »Easy Livin«, »Lady in Black«, »July Morning«, »Stealin«, »The Wizard« og aðrar, sum gjørdu bretska rockbólkin »Uriah Heep« til eitt heimsnavn. Nú spælir Ken Hensley við sínum egna bólki, og hann hevur verið nógv úti og spælt seinastu tíðina. Millum annað í Norðurlondum, í Russlandi og í Bretlandi.

Hóast Uriah Heep hevur spælt tvær ferðir í Føroyum, so var Ken Hensley, sum øll meta sum stóra mannin í bólkinum, ongantíð við. Men nú verður møguleikin at hoyra legenduna spæla live í Føroyum.

Ken Hensley er føddur í London 24. august 1945. Hann byrjaði at spæla gittar sum 12 ára gamal, og fyrstu ferð, hann spældi alment, var sum 15 ára gamal í 1960. Í 1965 stovnaði hann bólkin The Gods, og har spældi eisini kendi gittaristurin Mick Taylor úr »The Rolling Stones«. Ken Hensley skrivaði mesta av sangunum, sang og spældi Hammond. Orøskin til, at hann fór at spæla Hammond var, at Mick Taylor dugdi sera væl at spæla gittar. Tá visti eingin av, at hann fór at fáa sera stóran ávirkan á rocktónleikin júst sum orgulspælari.

Í 1970 varð navnið Uriah Heep fyrstu ferð brúkt. Nú spældi Hensley saman við øðrum tónleikarum, og hann var av álvara farin at gera góðar sangir.

Uriah Heep gjørdist eitt av stóru nøvnunum í 1970'unum. Tann gamla manningin við Hensley, Byron, Box, Kerslake og Thain hevði rættiligan vind í seglunum, og Uriah Heep verður í dag mett sum ein tann størsti bólkurin í bretskum rocktónleiki.

Ken Hensley var 10 ár uppi í Uriah Heep og hesi árini góvu teir 13 plátur út. Samstundis gav Hensley eisini tvær soloplátur út.

Manningin í bólkinum skifti nakað, basspælarin Gary Thain doyði, og kemiin í bólkinum var ikki tann sama. Í 1980 fór eisini Ken Hensley burtur úr, og hann fór at spæla í øðrum samanhangum, hann gav nýggja plátu út og spældi nógv í USA, men so valdi hann at taka seg aftur frá tónleiki.

Í 90'unum vóru tíðirnar broyttar, og Hensley leitaði aftur til sínar tónleikaligu røtur. Í 1994 kom ein nýggj pláta hjá honum við gomlum upptøkum, og í 1999 kom enn meira ferð á. Hann fór í studio aftur og gav eina nýggja fløgu út.

Síðani hevur hann spælt alsamt meira á konsertum, og nú leitar hann sær eisini til Føroya.

Ken Hensley býr í Spania, men ferðast nógv kring heimin við sínum egna bólki.

Stór nøvn á palli í Klaksvík

Nýggjur tónleikafestivalur verður í Klaksvík í døgunum frá 13. til 15. august. Tiltøk verða uttandura og í KÍ-høllini. Stóra konsertin verður á Vágsbø mitt í býnum leygardagin. Tá fara stór føroysk og útlendsk nøvn at spæla. Úr útlandinum kemur eitt nú Ken Hensley við sínum egna bólki, men eisini føroysk nøvn sum Frændur og Týr verða at hoyra.